# KRABBAMEINSFELAGIÐ

ÁRSFRÁGREIÐING 2020

**Krabbameinsfelagið**

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
T-postur kmf@krabbamein.fo

**Dagligur leiðari:**

Jansy Gaardlykke

**Ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur:**

Sólrun Jacobsen

**Skrivstova:**

Poula Norðbúð

**Nevndin í Krabbameinsfelagnum**

Formaður: Durita Tausen

Næstformaður

& kassameistari: Sonja Nielsen

Nevndarlimur: Magnus Magnussen

Nevndarlimur: Olga Kristina Hansen

Nevndarlimur: Johan Poulsen

Tiltakslimur: Martin Joensen

Tiltakslimur: Elmar Ósá

**Hjálpargrunnurin**

Durita Tausen

Olga Kristina Hansen

Jónvør Christiansen

**Team Rynkeby Føroyar**

Elmar Ósá

Sonja Nielsen

Durita Tausen

# Indhold


Fororð ..... 1

Inngangur ..... 2

Hjálp og ráðgeving  - afturvendandi tiltøk og tilboð ..... 2

Virksemi hjá hjálparbólkunum – teimum sjálvbodnu ..... 5

Hugnaløtur og tiltøk ..... 5

Stuðulsátøk, fundir, samstørv og annað virksemi í farna ári ..... 6

Ár eftir ár - Metstórur stuðul frá Team Rynkeby Føroyar ..... 6

Føroyar renna og FVHM í Vágum ..... 6

Fundir við Landssjúkrahúsið um viðgerð av bróstkrabba, screening og um fáa sett ein kliniskan sexolog ..... 6

Samstarv við Barnadeidina á Landssjúkrahúsinum um kontaktpersónsskipan ..... 7

Fundur við Fysiurgisku deild á Landssjúkrahúsinum ..... 7

Arbeiðið við at gera nýggja krabbameinsætlan fyri Føroyar er farið í gongd í 2020 ..... 7

Á vitjan hjá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinnu í almannamálum ..... 7

Evropeiskt og norðurlendskt samstarv ..... 8

Fíggjarligur stuðul og stuðul til gransking ..... 8

Spyr.fo og Krabbameinsfelagið halda fram við samstarvinum á fjórða ári ..... 8

Jólagávur frá Betri Banka og Bank Nordik ..... 8

Team Rynkeby Føroyar Grunnurin hjá Krabbameinsfelagnum – Fíggjarligur stuðul til álvarsliga sjúk børn ..... 9

Hjálpigrunnurin hjá Krabbameinsfelagnum ..... 9

Team Rynkeby hevur stuðlað útbúgving innan barnapalliatión ..... 9

Krabbameinsfelagið stuðlar ílegugransking av bróstkrabba ..... 9

Krabbamein og korona í Føroyum ..... 10

Krabbameinshagtøl ..... 12

# Fororð

Hvørt árið hevur sítt eyðkenni. 2020 hevur havt tað í ríkiligt mát, og eyðkennið hevur eitt navn. Korona.

Korona hevur merkt okkum øll, meiri og minni. Hjá teimum, sum eru álvarsliga sjúk, hevur støðan í flestu førum kenst enn tyngri. Samvera, og at kenna fløvandi góðsku og stuðul frá øðrum, ger ta tungu byrðuna lættari at bera. Tað hevur ikki borið til, hvørki sum medmenniskja, felag ella heilsustarvsfólk at veita stuðul, soleiðis sum vit plaga.

Øll hava vit tó roynt tað, sum vit kunnu.

Virksemið hjá Krabbameinsfelagnum varð sjálvandi eisini ávirkað. Hóast korona herjaði, so høvdu sjúklingar og avvarðandi tørv á at fáa hjálp, ráð og vegleiðing. Tað bar ikki til at fólk komu á gátt ella savnaðust í bólkum, so í felagnum løgdu vit stóran dent á at siga fólki, at tey altíð kundu ringja og skriva til okkara.

Støðan batnaði nokk so skjótt, og eftir summarfrítíðina í 2020 hevur virksemið tíbetur verið meiri, sum tað eigur. Fleiri av bólkunum, sum sjálvboðin standa fyri, hava havt hugnaløtur og tiltøk. Fimleikurin er aftur á skrá, og tíbetur ber til hjá fólki aftur at koma í Krabbameinsfelagið at práta við Jansy, Sólrun og Poulu. Tað er munin betri, enn bara at práta í telefon.

Óttin var eisini, at Sjúkrahúsverkið kanska ikki fór at hóra undan. Soleiðis hevur tíbetur ikki verið. Í USA og fleiri av londunum í Evropa, og eisini í okkara grannalondum, eru greið tekin um, at færri krabbameinstilburðir eru staðfestir í 2020 enn árini frammanundan. Tað er ikki sannlíkt, at tað veruliga eru færri tilburðir. Heldur er talan um, at færri eru staðfestir. Vit kunnu fegnast um, at hesa gongdina hava vit ikki sæð í Føroyum.

2020 er eisini árið, har landsstýrismaðurin í heilsumálum gjørdi av at seta sjøtul á arbeiðið at gera nýggja krabbameinsætlan. Arbeiðssetningurin er, at tilmæli skulu gerast um at fyribyrgja, staðfesta sjúkuna skjótast til ber, veita skjóta og dygdargóða viðger, veita góða og samskipaða sjúklingagongd, veita góða endurmenning, góða palliativa hjálp og at tryggja góð hagtøl á krabbameinsøkinum.

Staðfestu krabbameinstilburðirnir hava seinastu trý árini verið næstan 350 í miðal. Við nýggjari og dagførdari krabbameinsætlan er vónin hjá okkum í Krabbameinsfelagnum, at økið verður so væl skipað, at útlitini vera so góð, sum til ber hjá teimum, sum fáa boðini, at tey hava krabbamein.

Endamálið hjá Krabbameinsfelagnum er at hjálpa teimum, sum fáa boðini: ‘Tú hevur krabbamein’. Og at hjálpa teimum, sum eiga tey, sum fáa hesi boðini. Í 41 ár hevur tað borið til hjá okkum at hjálpt. Og tað hevur borið til, tí felagið fær dyggan stuðul. Frá sjálvbodnum. Fyritøkum. Feløgum. Einstaklingum. Takk fyri tykkara áhaldandi stuðul. Hann er grundarlagið undir okkara arbeiði.

Í 2020 var ætlanin at hava landsinnsavning, fyri aðru ferð í søgu felagsins. Vit vóru spent og gleddu okkum. Eingin ivi um, at tey sum skuldu súkkla við Team Rynkeby Føroyar gleddu seg og vóru líka spent at súkkla til Paris. Korona festi fót fyri tí, og tey sluppu ikki sína ferð. Kortini var stuðulin til Team Rynkeby Føroyar aftur í 2020 metstórur.

Í felagnum kendu vit tað, sum at vit fingu ein ordans bakkalóara, tá ið vit máttu avlýsa landsinnsavningina. Tíbetur lagar nógv seg við tíðini. Eisini í koronutíðini. Og hóast hetta er ársfrágreiðingin fyri 2020, fái eg ikki hildið mær at takka so innarliga og hjartaliga fyri allan tann stuðulin, sum Føroya fólk sýndi okkum til ‘Føroyar móti krabba’, sum var 27. mars í 2021.

1000 takk.

Durita Tausen,

formaður í Krabbameinsfelagnum

# Inngangur

2020 gjørdist eitt øðrvísi ár, har Koronufarsóttin broytti gerandisdagin um allan heim, eisini her hjá okkum. Krabbameinssjúklingar og teirra avvarðandi hava verið ávirkað av støðuni, ið gjørdist avbjóðandi og trupul hjá nógvum. Fyri nógv hevur hetta verið ein tíð við fleiri avmarkingum, og hjá fleiri eisini ein tíð fylt við einsemi, ótta og stúran.

Tað fyrstu tíðina ávirkaði farsóttin eisini virksemi hjá Krabbameinsfelagnum. Vit vóru noydd at steðga einum stórum parti av virkseminum, har fólk ikki longur kundu koma á gátt og nógv tiltøk vóru avlýst. Hetta førdi til broytingar og umleggingar. Vit máttu tillaga virksemi soleiðis, at vit kundu halda fram at veita hjálp og hava ymisk tiltøk. Tá ið ein tíð var farin, megnaðu vit at halda fram við nógvum av tilboðum, sum felagið hevur at bjóða, eisini í ymsu bólkunum, ið tey sjálvbodnu standa fyri. Skipað hevur verið fyri samrøðubólkum, fyrilestrum, hugnaløtum og øðrum átøkum. Vit hava havt nógvar telefonsamrøður og beinleiðis samrøður við sjúklingar, familjur og onnur avvarðandi, umframt skúlar, stovnar og heilsustarvsfólk.

Málið hjá Krabbameinsfelagnum er støðugt at hjálpa tí sjúka, familjuni og teimum, sum eru rundan um. Óansæð um krabbameinssjúka nýliga er staðfest, undir og eftir sjúku, so veita vit kunning, hjálp og stuðul til hvørt stig á leiðini. Eisini til tey, sum hava mist. Vit bjóða eina røð av tilboðum og tænastum, sum kunnu vera við til at hjálpa tí sjúka og teimum avvarðandi fram á leið og í støðuni, sum tey eru í.

At svara spurningum, geva vón, vegleiðing og dagførda upplýsing um krabbamein hevur høga raðfesting og er ein sjálvsagdur partur í okkara arbeiði.

Umframt hetta veita vit stuðul til gransking og upplýsa um fyribyrging av krabbameini.

Vit vitja á stovnum, fyritøkum og skúlum fyri at veita hjálp og ráðgeving, umframt at kunna um Krabbameinsfelagið og tað, sum vit hava at bjóða.

Vit hava eina heimasíðu: krabbamein.fo, facebook og Instagram, har vit leggja kunning út um øll okkara tiltøk og tilboð.

Krabbameinsfelagið fylgir eisini væl við í tí sum hendir á krabbameinsøkinum, og royna vit at gera okkara ávirkan galdandi har tað er neyðugt, fyri at bøta um umstøðurnar hjá krabbameinssjúkum og teimum, ið varða av. Felagið hevur gott samskifti og samstarv við politiska myndugleikan, heilsu- og almannaverk, kommunur, fyritøkur og aðrar stovnar bæði í Føroyum og uttanlands.

# Hjálp og ráðgeving - afturvendandi tiltøk og tilboð

**Persónligar samrøður og familjusamrøður**

Vit bjóða fólki við krabbameini at ringja ella koma til samrøður á felagnum ella heima, um ynski er um tað, samrøður við familju, onnur avvarðandi o.o. Familjusjónarhornið hevur stóran týdning í ráðgevandi arbeiðinum hjá felagnum. Tá ið ein í familjuni gerst sjúk/ur ella doyr, rakar tað alla familjuna, eisini børnini. Endamálið við familjusamrøðunum er at geva familjuni høvi at savnast um tað sum fyllir og er tungt at bera einsamallur ella einsamøll.

Vit bjóða eisini familjusamrøður til familjur, har børn og ung missa ella hava sjúk foreldur ella systkin. Undir slíkum umstøðum kunnu børn og ung vera undir øktum sálarligum og sosialum trýsti. Vandin er, at onkur kunnu fáa m.a. sálarligar trupulleikar, so sum ótta, tunglyndi, svøvntrupulleikar og atferðartrupulleikar. Eitt samanspæl av nógvum ymiskum faktorum eru avgerandi fyri, hvussu tað gongur hjá hvørjum einstøkum barni, bæði fyrstu tíðina og sum frá líður. Tað økta sálarliga og sosiala trýstið kemur ofta av broytingum í familjuni og í gerandisdegnum. Tað kann vera ótti fyri framtíðini, um tann sjúki fer at doyggja ella at sjúkan versnar.

Ótti og aðrar kensluligar broytingar hjá hinum í familjuni kunnu eisini ávirka børnini og tey ungu. Hvussu familjan hevur tað, hevur soleiðis víst seg at hava stóran týdning fyri, hvussu børn og ung megna støðuna. Nógvar familjur megna broytingarnar sum koma, meðan aðrar familjur hava tað torført við hesum.

Tí kann tað vera gott at koma til eina familjusamrøðu, og soleiðis fáa hjálp til saman at handfara truplu støðuna, seta orð á tað sum er gott og á tað, ið er svárt og torført. Á henda hátt fáa hjálp at stuðla og hjálpa hvør øðrum, umframt fáa kensluna av at standa saman. Tað eru fleiri og fleiri, ið koma til einstaklinga– og familjusamrøður. Okkara royndir eru, at fólk eru glað fyri at fáa henda møguleika, ið ger tey betur før fyri at handfara torføru støðuna, tey eru í.

**Samtalubólkur fyri tey, sum hava mist makan**

Tað kann vera trupult at handfara sorgina, tá ið ein missir makan av krabbameini. At hitta onnur í somu støðu kann lætta um tunga, torføra og stundum einsliga stríðið at fóta sær aftur. Endamálið við at savna fólk, sum øll hava mist makan, er at geva tí einstaka møguleika at seta orð á og viðgera tær kenslur, tankar og trupulleikar, sum missurin ber í sær. Fáa styrki til at koma eitt fet víðari í lívinum, í samtalu við onnur í somu støðu. Í 2020 varð bara ein bólkur og hann byrjaði 16. september. Tey vóru 8 og vóru saman 14. hvønn dag í 2½ tíma hvørja ferð, 7 ferðir í alt. Afturmeldingarnar vóru sera jaligar. Fólk vóru glað fyri at møtast og eftir lokið skeið, hevur bólkurin gjørt av at halda áfram at hittast.

**Samtalubólkur fyri foreldur, ið hava mist vaksin børn**

Á heysti í 2020 byrjaðu vit ein bólk fyri foreldur, sum hava mist vaksin børn av krabbameini. Her høvdu tey møguleika at hitta og tosa við onnur í somu støðu. Hóast børnini vóru vaksin, flutt heimanífrá og  høvdu egna familju, so bera foreldur ofta stóra sorg yvir at hava mist sítt vaksna barn. Tað kann verða torført at fáa rúmd fyri sorgini, m.a. tí, at vaksnu børnini kanska høvdu maka og børn, ið nú sita eftir, og tað er natúrligt at foreldur fyrst og fremst hugsa um tey. Hetta kann fáa foreldur at skúgva egna sorg til viks, ið kann føra við sær, at teirra egna støða gerst trupul og tung. Hesi foreldur høvdu sera stóra gleði av at koma saman í bólkinum, ið hevur givið teimum styrki og mót í sorgini. Tey hava knýtt vinabond og halda fram at hittast sum ein netverksbólkur.

**Skeið í hár-, húð- og andlitsrøkt fyri kvinnur við krabbameini**

Body Shop í SMS skipar regluliga fyri skeiðum í hár-, húð- og andlitsrøkt. Umframt starvsfólk er eisini hárskeri við royndum í at gera hárkollar til staðar. Skeiðið er fyri kvinnur, sum nýliga eru farnar í viðgerð fyri krabbamein. Eisini hevur Body Shop afturvendandi vælverukvøld fyri kvinnur, sum eru varandi sjúkar. Krabbameinsfelagið samstarvar við Body Shop og tekur sær av at lýsa og kunna um skeiðini, ið eru ókeypis. Í 2020 var bara eitt vanligt skeið, umframt eitt vælverukvøld fyri kvinnur, sum eru varandi sjúkar av krabba. Kvinnurnar, ið koma til skeiðini eru fegnar um møguleikan at fáa upplæring og íblástur til at røkta húð og hár, umframt at læra at at smyrja sær.

**Sosialráðgevi**

Tá ið krabbameinsjúka rakar, verða tann sjúki og tey avvarðandi eisini ofta rakt sosialt. Nógvir sosialir og fíggjarligir spurningar koma upp at venda. Tí bjóðar Krabbameinsfelagið ráð og vegleiðing frá einum sosialráðgeva. Tað eru fleiri, ið taka av hesum møguleika.

Í 2020 vendu fólk sær í høvuðsheitum til sosialráðgevan, tí at inntøkugrundarlagið er hótt – antin tí tey eru søgd úr teirra starvi, uppsagnartíðin er við at renna út, ella tí veiting eftir sjúkradagpengalógini er um at vera uppi. Í fleiri førum verður vegleitt í at søkja um fyritíðarpensjón, tí støðan tíanverri kann verða soleiðis, at viðkomandi ikki megnar at fara til arbeiðis aftur. Tey, ið møguliga ikki megnað at arbeiða fulla tíð vegna fylgjur av krabbameinssjúkuni, verða kunnað um møguleikan at koma í tillagað starv. Har útlitini eru góð fyri, at tey aftur komu í vinnu, men har tey ikki megnað hetta áðrenn uppsøgn fær virknað ella áðrenn 40 viku reglan í sjúkradagpengalógini ger seg galdandi, kann verða søkt um forsorgarveiting.

Sum heild bøta verandi sosialu skipanir í Føroyum um fíggjarligu fylgjurnar av sjúkuni. Tó metir Krabbameinsfelagið, at tað átti at verið arbeitt fram ímóti m.a. serligari reglu fyri tey, sum eru leingi sjúk, har útlit eru fyri, at tey kunnu koma í arbeiði aftur, so at tað ikki er neyðugt við eini uppsøgn. Eisini er tørvur á serligum reglum, soleiðis at avvarðandi kunnu vera um tann sjúka ella doyggjandi, eitt nú at vaksin børn kunnu vera um síni foreldur ella foreldur kunnu vera um síni vaksnu børn, t.v.s. eisini um børnini eru eldri enn 18 ár. Hetta vísti felagið eisini á, tá ið felagið var á fundi við Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýriskvinnu í Almannamálum fyrst í januar mánaði 2020.

**Rørslutilboð**

Krabbameinsfelagið hevur rørsutiltøk ymsa staðni í landinum. Tiltøkini eru fyri øll, sum hava ella hava havt krabbamein. Tey avvarðandi eru vælkomin at luttaka. Dentur verður lagdur á venjingar, sum geva styrki og kondition. Rørsla og styrkivenjing hava stóran týdning, bæði likamliga og sálarliga. Ítróttur og rørsla betra um útlitini fyri at fáa heilsuna aftur, samstundis, sum tað gevur styrki at standa ímóti hørðu viðgerðini.

Eitt rørslutiltak er í Havn, ið nevnist Firvaldar. Vant verður hósdagar kl. 14.30 til 15.30 í fimleikarhøllini FIMI, ið hevur sera góðar umstøður.

Vit fegnast um, at vit í 2020 fingu eitt rørslutilboð í Klaksvík. Tilboðið er í samstarvi við Klaksvíkar kommunu og Kvøldskúlan í Klaksvík, við stuðli frá kommununum í Norðoyggjum. Vant verður hvørt hóskvøld kl. 19.00 – 20.00 í kjallaranum á Sambýlinum á Heygum.

Vit fegnast eisini um at tað í desember mánaði eydnaðist at fáa í lag avtalu um rørslutilboð í Vágum. Tilboðið byrjar í januar 2021 og vant verður mánadagar kl. 19.00 – 20.00 í venjingarhølunum hjá Ven í Miðvági.

Rørslutilboðið í Suðuroy hevur ikki verið virkið meginpartin av 2020. Farið verður undir aftur venjingar í 2021.

Samanhaldið millum íðkararnar er sera gott og hava tey stóra gleði av at hittast hvørja viku, umframt at tað eru fleiri og fleiri, ið brúka henda møguleika. Umleið 5. hvørja viku bjóðar Krabbameinsfelagið ein drekkamunn aftaná venjingarnar.

**Sjúkrarøktarfrøðilesandi í starvsvenjing**

Seinastu nógvu árini hava sjúkrarøktarfrøðilesandi frá Sjúkrarøktarfrøðideildini á Fróðskaparsetri Føroya verið í starvsvenjing í Krabbameinsfelagnum. Vit eru fegin um at hava lesandi. Hetta ger, at tey fáa innlit í arbeiðið í Krabbameinsfelagnum og innan kabbameinsøkið. Harafturat gevur tað okkum nýggjan íblástur, er mennandi og gevandi fyri felagið.

Lesandi vóru í Krabbameinsfelagnum í viku 40. Tær hava verið við til samrøðubólk fyri fólk, sum hava mist makan og verið til rørslutiltøkini, umframt onnur tiltøk. Tær hava eisini verið til staðar, meðan starvsfólkini hava havt samrøður umvegis telefon. Tær lesandi vóru sera glaðar fyri at vera í Krabbameinsfelagnum og kundu gott hugsað sær at verið longri.

# Virksemi hjá hjálparbólkunum – teimum sjálvbodnu

**Hugnaløtur og tiltøk**

Tá ið krabbameinssjúka verður staðfest, er vanligt at hava nógvar spurningar. Tørvur á upplýsing, vitan, stuðli og hjálp kann vera stórur. Tað er gott at fáa nógva og góða hjálp frá familju, vinum og fakfólki. Okkara royndir vísa, at tað harafturat hjálpir at hitta onnur í somu støðu og sum hava kent sjúkuna á egnum kroppi. Tí bjóðar felagið fólki at koma í samband við hesi, ið virka sum sjálvboðin hjá felagnum. Tey sjálvbodnu hava fingið upplæring frá Krabbameinsfelagnum at veita stuðul, ráð og vegleiðing til onnur í somu støðu og í fullum trúnaði práta um tað, ið er tungt at bera.

Tey sjálvbodnu skipa eisini fyri ymiskum tiltøkum so sum hugnaløtum, fyrilestrum, útferðum, gongutúrum og innsavning. Tiltøkini, sum vóru í 2020 vóru væl vitjað, tó at tey vóru merkt av koronutilmælunum.

**Tann 29. januar** varð eitt tiltak fyri menn við prostatakrabba. Umleið 20 menn komu til tiltakið. Á skránni var prát og hugnalig samvera.

**Tann 4. mars** hevði bróstkrabbabólkurin Bót til bata opið hús. Allar kvinnur, sum hava ella hava havt bróstkrabba, vóru vælkomnar og tær kundu hava avvarðandi við. Fleiri kvinnur møttu og vóru glaðar fyri at hitta aðrar í somu støðu.

**Bót til bata varpar ljós á bróstkrabba í oktober.** Á nærum hvørjum ári varpar Bót til bata ljós á bróstkrabba í oktober mánaði og ofta í samstarvi við føroyskan sniðgeva, ið sniðgevur ársins bróstkrabbalut. Í 2020 varð samstarv gjørt við Shisa Brand, sum hevur sniðgivið einar oyrnalokkar og eitt net. Á netinum eru hondteknað bróst, og uppímillum er okkurt teirra tikið. Bróstini eru ymisk í støðd og skapi og undirstrika boðskapin um, at eingi bróst eru eins. Á baksíðuna á netinum hevur Sjúrður Gullbein skrivað eina heilsan til bróstini.

Oyrnalokkurin er ein gullketa við einum ljósareyðum ullbólti og eini perlu í endanum. Ullbóltarnir, sum eru úr føroyskari ull og litaðir ljósareyðir, ímynda bróstið. Og líka sum eingi bróst eru eins, eru eingir ljósareyðir ullbóltar eins; summir eru stórir, aðrir smáir, summir eru fastir, aðrir bleytir. Undirtøkan av at ogna sær hesar lutir var stór og vóru teir útseldir eftir stuttari tíð.

Filmur varð lagdur út á facebook um at kanna bróstini, ið hevur verið væl umtóktur.

Eisini gjørdi bólkurin kunnandi tilfar um bróstkrabba við søgum frá kvinnum, ið eru ella hava verið sjúkar, sum varð lagt út á sosialar miðlar í oktober mánaði.

**Mikukvøldið 23. september** skipaði undirlívsbólkurin fyri hugnaløtu. Kvøldið var sera væl eydnað og vóru kvinnurnar glaðar fyri at hittast og tosa við aðrar í somu støðu.

**Tann 28. september** hevði lip- og lymfødembólkurin eitt tiltak. Eliesari Olsen, serlækni í plastikkirurgi helt fyrilestur um lip– og lymfødem sæð út frá einum læknaligum sjónarhorni. Hann kom eisini inn á, hvussu umráðandi tað er at hava fokus á vekt og rørslu, saman við bandagering og kompressión.

Bólkurin heldur eisini, at ov lítil vitan er um hesar sjúkur millum kommunulæknar. Teir eru ikki nóg væl ílatnir at tosa við sjúklingin um lip– og lymfødem. Harafturat eru teir ofta ikki nóg væl førir fyri at staðfesta sjúkuna. Bólkurin arbeiðir tí við at gera kunnandi tilfar til kommunulæknar í samstarvi við Fysiurgisku deild á Landssjúkrahúsinum.

**Tann 7. oktober** skipaði bólkurin fyri makar hjá monnum við prostatakrabba fyri hugnakvøldi í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum. Mona við Reiðlið hevði fyrilestur um "Lívsgóðska hóast avbjóðingar". Mona er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og hevur lisið positiva sálarfrøði. Eisini vóru stundir til hugnaligt prát og samveru.

**Mikukvøldið 18. november** skipaði prostatabólkurin aftur fyri tiltaki, har Trine Skov Eysturoy, fyrsioterapeutur hevði undirvísing um kokubotnsvenjingar. Tiltakið eydnaðist sera væl, nógvir mans møttu og afturmeldingarnar vóru sera góðar.

**Foreldrabólkurin.** Vegna koronu varð ikki skipað fyri útferðum ella árliga jólahugnanum fyri familjur at børnum við krabbameini. Í staðin fingu allar familjurnar eina jólagávu.

## Stuðulsátøk, fundir, samstørv og annað virksemi í farna ári

**Ár eftir ár - Metstórur stuðul frá Team Rynkeby Føroyar**

Team Rynkeby Føroyar er vælgerðandi súkklulið við fólki, sum á hvørjum ári sjálvboðin súkkla til Paris, fyri at savna pening inn til børn við lívshættisligum sjúkum og familjur teirra.

Tá ið Team Rynkeby Føroyar byrjaði á fyrsta sinni í 2014, varð stuðul einans latin børnum við krabbameini og familjum teirra. Hetta er nú broytt, soleiðis at stuðul eisini verður latin børnum við lívshættisligum sjúkum. Peningurin, ið kemur inn, fer eisini til at stuðla gransking í omanfyrinevndu sjúkum. Krabbameinsfelagið umsitur peningin, og familjur at børnum við hesum sjúkum og onnur kunnu venda sær til Krabbameinsfelagið at fáa meiri kunning um stuðulsmøguleikar.

Peningurin, sum Team Rynkeby Føroyar savnaði inn í sambandi við túrin, ið skuldi vera til Paris í 2020, men sum varð avlýstur vegna koronu, varð í september handaður Duritu Tausen, formanni í Krabbameinsfelagnum. Stuðulin var á kr. 1.540.000

Vit eru sera takksom fyri stuðulin, ið gevur okkum betri møguleika at stuðla familjum við álvarsliga sjúkum bønum, umframt at veita betri stuðul til gransking. Sí meira um stuðul á síðu 10.

**Føroyar renna og FVHM í Vágum**

Bragdið skipaði tann 7. juni, við stuðli frá Tórshavnar kommunu, fyri tiltakinum “Føroyar Renna”. Tað var ókeypis at luttaka, men luttakarar og onnur kundu eftir hugi og førimuni lata nakrar krónur, sum Bragdið síðan lat Krabbameinsfelagnum.

Inn komu ikki færri enn 22.250 krónur, sum tær báðar Ann Thomsen og Ann-Mari av Skarði frá Bragdinum handaðu Krabbameinsfelagnum tann 20. juli. Annika Olsen, borgarstjóri, sum eisini er íðin rennari, var hjástødd.

Í Krabbameinsfelagnum eru vit takksom fyri at sleppa at vera partur av tiltøkum hjá Bragdinum og Frælsi. At vit soleiðis kunnu gera vart við felagið, umframt at stimbra fólki at ganga. Vit takka hjartaliga fyri stuðulin og øllum teimum, sum hjálptu til.

**Fundir við Landssjúkrahúsið um viðgerð av bróstkrabba, screening og um fáa sett ein kliniskan sexolog**

Fleiri fundir hava seinasta árið verið við Landssjúkrahúsið um bróstkrabbaviðgerðina. Skurðviðgerðin fyri bróstkrabba er komin í fasta legu og hon virkar væl. Í oktober var plastskurðlækni á fyrsta sinni í Føroyum. Eftir ætlan skal hon vera á Landssjúkrahúsinum 4-6 ferðir um árið. Allar kvinnur, ið eru skurðviðgjørdar, verða innkallaðar eitt ár eftir skurð, har tosað verður um hvussu hevur gingið, og um møguleikan fyri evt rekonstruktión.

Umleið 85% av kvinnum taka av tilboðnum um mammografiscreening. Síðan farið var undir at screena, eru fleiri tilburðir av bróstkrabba staðfestir, umframt at knútarnir, ið verða funnir, eru minni.

Krabbameinsfelagið hevur áhaldandi vist á týdningin at fáa sett ein kliniskan sexolog. Politiski myndugleikin hevur tíverri ikki raðfest tað enn.

Avtalað er, at Landssjúkrahúsið og Krabbameinsfelagið skulu hittast hálvárliga í 2021.

**Samstarv við Barnadeidina á Landssjúkrahúsinum um kontaktpersónsskipan**

Avtalað er við Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum at samstarva um at skipa eina kontaktpersónsskipan til familjur at børnum við krabbameini. Eina skipan, sum tekur hond um familjuna og barnið, frá tí barnið fær staðfest krabbamein, er undir viðgerð og til tað er frískt aftur ella er í eini palliativari sjúkugongd. Barnadeildin hevur sett Elmar Ósá, barnalækna, og tveir sjúkrarøktarfrøðingar at átaka sær at vera kontaktpersónar fyri barnadeildina.

**Fundur við Fysiurgisku deild á Landssjúkrahúsinum**

Krabbameinsfelagið hevur havt fund við Fysioterpi deildina á Landssjúkrahúsinum um umstøðurnar hjá teimum, sum hava lymfødem. Tað eru bara tveir fysioterapeutar, sum geva viðgerð til fólk við lymfødem í Føroyum, og peningur er settur av at útbúgva ein afturat. Stórur partur av arbeiðsorkunini hjá hesum fysioterapeutum fer tíverri til samskifti við Almannaverkið í sambandi við umsóknir um kompressiónssokkar. Felagið fer undir at kanna, um til ber at fáa broytt hesa mannagongdina.

**Arbeiðið við at gera nýggja krabbameinsætlan fyri Føroyar er farið í gongd í 2020**

Arbeiðið við nýggju krabbameinsætlanini er býtt í tveir partar og skal vera liðugt í seinasta lagi 1. juli 2021. Tann fyrri parturin er ein eftirmeting av verandi krabbameinsætlan frá 2009, har hugt verður at, hvørji tilmæli enn liggja á láni, og hvussu tey kunnu setast í verk. Seinni parturin snýr seg um at lýsa verandi støðu við atliti at krabbameinsfyribyrging og sjúklingagongdum hjá føroyskum krabbameinssjúklingum. Metast skal um styrkir og veikleikar og arbeiðsbólkurin skal koma við tilmælum um átøk og fyriskipanir at fyribyrgja krabbameini og tryggja best møguligar sjúklingagongdir.

Ítøkiliga skal arbeiðsbólkurin gera tilmæli um:

- At fyribyrgja, at fólk fáa krabbamein
- At staðfesta krabbamein skjótast til ber
- At veita skjóta og dygdargóða viðgerð, so fleiri gerast frísk, og betra útlitini fyri at liva longri við sjúkuni
- At veita eina góða og samskipaða sjúklingagongd – bæði í føroyska heilsuverkinum og millum føroyska heilsuverkið og viðgerðarstovnar uttanlands, og har tað verður tryggjað, at ongin krabbameinssjúklingur bíðar longri enn 30 dagar eftir útgreining og viðgerð
- At veita eina góða endurmenning við tí endamáli, at sjúklingar og avvarðandi verða hjálpt til ein gerandisdag, sum er so innihaldsríkur sum gjørligt, og har tey kunnu virka so sjálvstøðugt sum til ber
- At veita eina so góða palliativa hjálp, sum til ber, seinastu tíðina, fólk liggja sjúk. Hesin parturin kann verða grundaður á tilmælið um palliasjón, frá 2019
- At tryggja góð hagtøl á økinum – herundir nágreinilig og dagførd hagtøl, millum annað um hvussu nógvir tilburðir eru, hvussu nógv gerast frísk, hvussu leingi fólk liva við sjúkuni, og hvat deyðiligheitin er
- At lýsa fyrisitingarligar, starvsfólkaligar og fíggjarligar avleiðingar av tilmæltu uppskotunum

Arbeiðið er skipað við arbeiðsbólki, stýrisbólki og tilvísingarbólki.

**Á vitjan hjá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinnu í almannamálum**

Tann 7. januar var Krabbameinsfelagið á fundi við Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinnu í almannamálum, har Krabbameinsfelagið kunnaði um virksemið hjá felagnum, umframt at vísa á ábøtur, sum felagið heldur eru neyðugar á almannaøkinum.

Tíbetur eru tað fleiri og fleiri sum gerast frísk av krabbameini, ella sum liva longur, hóast sjúku. Tað kann taka drúgva tíð at basa sjúkuni, og tað vísir seg, at galdandi lóggáva loftar ikki tí nóg væl. Undir teimum umstøðunum er fíggjarliga hjálpin til tey nærmastu heldur ikki nøktandi.

Tað hevði bøtt væl um, um sjúkudagpeningar kundu verið veittir í longri tíð enn í dag.

Fyri lívsgóðskuna hevur tað eisini nógv at siga at kunnu arbeiða, alt eftir hvør orkan er. Í dag ber til at fáa tillagað starv, men so skal arbeiðsførleikin vera varandi skerdur. Um lóggávan verður broytt soleiðis, at tað ber til at fáa tillagað starv í avmarkað tíðarskeið, so kunnu tey, sum hava brúk fyri longri tíð at koma fyri seg aftur, varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og eisini varðveita fíggjarliga lívsgrundarlagið.

Landsstýriskvinnan greiddi frá, at tey eru í gongd við at gera uppskot til Vælferðarlóg. Uppskotið hevur til endamáls at laga vælferðarskipanina til føroysk viðurskifti.

Krabbameinsfelagið fegnast um tær ábøtur, sum eru í uppskotinum um Vælferðarlóg. Vónandi verður hon so góð, at fer at bera til hjá fleiri at varðveita sítt arbeiði, umframt at tað eisini slepst undan fíggjarligum smeiti, hóast drúgva sjúkralegu.

### Evropeiskt og norðurlendskt samstarv

Krabbameinsfelagið er limur í bæði evropeiskum og norðurlendskum samstørvum við krabbameinsfeløgini í hesum londum.

Tað evropeiska krabbameinssamtakið eitur Association of European Canacer Leagues, stytt ECL, og tað norðurlendska eitur Nordic Cancer Union, stytt NCU. Vanliga møtast feløgini til samstarvsfundir nakrar ferðir árliga at umrøða og samstarva um týðandi mál, sum hava við krabbamein, viðgerð, røkt og gransking at gera.

Norðurlendski krabbameinsfelagsskapurin NCU veitir eisini fíggjarligan stuðul til verkætlanir, ið stimbra samstarv í gransking av krabbameini í norðurlendsku londunum. Ein treyt er, at verkætlanin fevnir um granskarar, sum arbeiða í tveimum ella fleiri norðurlendskum londum.

## Fíggjarligur stuðul og stuðul til gransking

### Spyr.fo og Krabbameinsfelagið halda fram við samstarvinum á fjórða ári

Spyr.fo er spurnatænasta, sum ger skjótar spurnakanningar millum føroyingar á fartelefonini. Fyri hvønn luttakara letur tann, sum ger kanningina, 4 krónur til Krabbameinsfelagið.

Higartil hava gott 5000 føroyingar teknað seg til spyr.fo, og soleiðis útvegað Krabbameinsfelagnum stuðul. Í 2020 var stuðulin kr. 96.072.

### Jólagávur frá Betri Banka og Bank Nordik

Stuðulsgrunnurin hjá Betri Banka hevur í 2020 latið Krabbameinsfelagnum stuðlsgávu á kr. 50.000 og Bank Nordik hevur latið Krabbameinsfelagnum eina gávu á kr. 25.000.

Krabbameinsfelagið takkar hjartaliga fyri hesar stórfingnu gávur.

**Team Rynkeby Føroyar Grunnurin hjá Krabbameinsfelagnum – Fíggjarligur stuðul til álvarsliga sjúk børn**

Í Føroyum savnar Team Rynkeby Føroyar inn pening, so at familjur at børn við lívshættisligum hjarta- og lungnasjúkum og við krabbameini kunnu søkja um stuðul. Á hvørjum ári fáa børn, ið eru álvarsliga sjúk og stødd í Danmark á jólum í sjúkuørindum, eina jólagávu. Gávan er ein peningagáva, sum tey kunnu nýta at forkela barnið og tey sjálvi við.

At tað eru fólk, ið sjálvboðin hava lagt so nógv fyri, at súkkla langa teinin til Paris fyri at savna inn pening til børn, ið eru álvarsliga sjúk, uppliva familjurnar sum nakað heilt serligt og tær vísa stórt takksemi.

Í 2020 varð stuðul latin átta familjum við sjúkum børnum, umframt at tvey sjúk børn, ið vóru stødd í Danmark á jólum, fingu jólagávur.

**Hjálpigrunnurin hjá Krabbameinsfelagnum**

Krabbameinssjúklingar kunnu fáa fíggjarligan stuðul úr Hjálpargrunninum hjá Krabbameinsfelagnum. Stuðul kann verða veittur til sjúkligar, sum innanfyri seinastu tvey árini hava verið í viðgerð fyri krabbamein og sum eru búsitandi í Føroyum. Í 2020 fingu 30 fólk stuðul úr Hjálpigrunninum.

**Team Rynkeby hevur stuðlað útbúgving innan barnapalliatión**

Hansina Mikkelsen og Sólrun Jakobsen, báðar sjúkrarøktarfrøðingar, hava seinasta árið tikið víðari útbúgving innan barnapalliatión á OsloMet universiteti, sum kallast «Tverrfaglig videreutdanning i barnepallition».

Hetta er ein serstøk víðari útbúgving sum er stovnsett við tí endamáli, at fyriskipa eitt barnapalliativt tilboð til familjuna við álvarsligum og lívshóttandi sjúkum børnum. Tær eru tær fyrstu, sum hava nomið sær víðari útbúgving innan barnapalliatión í Føroyum og tær hava fingið fíggjarligan stuðul á kr. 67.000 til útbúgvingina frá Team Rynkeby Føroyar Grunninum hjá Krabbameinsfelagnum.

**Krabbameinsfelagið stuðlar ílegugransking av bróstkrabba**

Tann 1. september 2020 fór Elisabet Thomsen, MSc í lívfrøði, í gongd við eina verkætlan innan bróstkrabba. Endamálið við verkætlanini er at finna og lýsa orsøkina til bróstkrabba hjá føroyskum kvinnum. Krabbameinsfelagið hevur stuðlað verkætlanini við 300.000 kr., harav eru 100.000 kr. frá Bót til Bata, sum er ein bólkur hjá Krabbameinsfelagnum fyri kvinnur við bróstkrabba.

Verkætlanin fer væntandi at økja vitanina um bróstkrabba í Føroyum og leggja lunnar undir ílegukanningar, sum eru lagaðar serliga til føroyingar.

Verkætlanin er eitt samstarv millum Ílegusavnið, Landssjúkrahúsið, Rískisjúkrahúsið og Fróðskaparsetur Føroya. Umframt stuðulin frá Krabbameinsfelagnum, hevur verkætlanin fígging frá Sjúkrakassagrunninum og Granskingarráðnum.

**Krabbameinsfelagið stuðlar verkætlan innan palliativa røkt**

Í desember mánaði játtaði felagið at stuðla Phd verkætlan hjá Elsu Johannesen, Phd. lesandi á Fróðskaparsetri Føroyar, um hvussu palliativ røkt í heimatænatuni verður upplivað av avvarðandi og sjúkrarøktarfrøðingum. Stuðulin var góðar 80.000 kr.

## Krabbamein og korona í Føroyum

Í fleiri londum uttan um okkum, hevur koronufarsóttin ávirkað, hvussu nógvir krabbameinstilburðir eru staðfestir. Færri tilburðir eru staðfestir í ár, og krabbamein hevur verið staðfest seinni í sjúkugongdini. Hetta hava tey eitt nú kannað í Stóra Bretlandi, USA, Hollandi, Svøríki, Norðurírlandi og Danmark.

Tíbetur síggja vit ikki hesa gongdina í Føroyum. Hetta vísir Marnar Fríðheim Kristiansen, ph.d. lesandi, á í grein, sum hann hevur skrivað fyri Krabbameinsfelagið.

Títtleikin av krabbameini er tann sami ella eitt sindur hægri í mánaðunum, meðan korona hevur herjað, borið saman við sama tíðarskeið tey seinastu fýra árini. Í mars og apríl mánaði vóru tølini nakað hægri enn undanfarin ár. Tað síggjast smá sveiggj, men hetta er væntandi við so smáum tølum.

Tað er ikki sannlíkt, at færru staðfestu tilburðirnir í londunum uttan um okkum standast av, at tað veruliga eru færri tilburðir. Heldur er talan um eina sonevnda undirdiagnostisering, t.e. at ikki allir krabbameinstilburðir verða staðfestir. Tað er trupult neyvt at vísa á, við kanningum grundaðar á hagtølini, hví so er, men roknað kann verða við, at serliga tvær orsøkir gera seg galdandi. Onnur er, at heilsuverkið hevur verið ovbyrjað av handfaringini av koronufarsóttini - eisini kommunulæknin, ið ikki hevur havt møguleika at tikið ímóti sjúklinginum, ella at hann hevur drálað at sent sjúklingin til nágreiniligari kanningar. Hin orsøkin kann vera, at fólk hava aftrað seg at fara til lækna, tí tey hava borið ótta fyri at verða smittað við koronu, ella tí at tey ikki hava viljað ovbyrjað heilsuverkið, serliga fyrstu tíðina, farsóttin herjaði.

Tølini í Føroyum eru fingin til vega úr sjúklingajournalum, og allar nýstaðfestar krabbameinsdiagnosur eru tiknar við. Hetta er síðan borið saman við tølini somu tíð árini frammanundan. So eru tølini aldursstandardiserað, t.e. lagt er upp fyri aldri, so tað rættvísandi kann verða borið saman við undanfarin ár.

Handfaringin av koronu í Føroyum hevur merkt, at vit hava verið minni ávirkað av strongum tiltøkum. Heilsuverkið hevur heldur ikki verið so nógv ávirkað av, at fólk hava verið innløgd við koronu, sum fyrst var stúrt fyri. Tað kann vera orsøkin til, at staðfestu krabbameinstilburðirnir ikki eru fækkaðir í Føroyum, eins og aðrastaðni.

Hetta er at fegnast um, tí tað er týdningarmikið, at krabbamein verður staðfest tíðliga í sjúkugongdini, so at viðgerð kann verða veitt á besta hátt.

Umframt at hava týdning fyri føroyska heilsuverkið og krabbameinsøkið í Føroyum, verður henda uppgerð eisini brúkt til millumtjóða samanbering ímillum Norðurlond. Endamálið er at síggja, hvussu tað hevur ávirkað krabbameinsøkið, at korona er handfarin so ymiskt.




Allir krabbameinstilburðir eru gjørdir upp fyri hvønn mánað árini 2016-2020. Tølini eru aldurssett eftir norðurlendskari støðisvekt. Keldan til hagtølini er sjúklingajournalir, har fyrsta krabbameinsdiagnosan er tikin við. Reyði stabbin eru tølini í 2020. Teir bláu stabbarnir vísa tølini frá 2016-2019 og tann grøna linjan er miðal fyri árini 2016-2019.

Talið av nýstaðfestum krabbameinstilburðum er ikki lækkað, hóast tað kundi verið væntandi, um so var, at korona hevði tarnað heilsuverkinum í vanliga virkinum at viðgera og útgreina.

Úrslitini benda á, at góða handfaringin av koronufarsóttini í Føroyum hevur tryggjað, at heildarútgreinanin av krabbameini ikki hevur verið stórvegis ávirkað.

# Krabbameinshagtøl

Talan er um fyribils tøl, sum skulu takast við fyrivarni!

## Krabbameinstilburðir í Føroyum árini 1995 – 2020




## Tilburðir av prostatakrabba



## Tilburðir av bróstkrabba




## Tilburðir av lungnakrabba



## Tilburðir av krabbameini í brisi




## Tilburðir av undirlívskrabba



## Tilburðir av krabba í maga og tarmi




| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Spísirør | 2 | 1 | 6 | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 | 5 | 4 | 9 | 8 |
| Magi | 3 | 5 | 3 | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 | 3 | 5 | 7 | 8 |
| Tjúkktarm | 16 | 12 | 19 | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 | 28 | 32 | 31 | 45 |
| Endatarm | 11 | 11 | 11 | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 | 8 | 14 | 18 | 11 |

## Tilburðir av húðkrabba




| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Móðurkerkjakrabbi | | 1 | | 2 | 1 | 2 | 2 | 5 | 4 | 7 | 17 | 10 | 6 | 8 | 2 | 7 | 6 | 6 | 3 | 1 | 3 | 9 | 8 | 5 | 3 | 6 |
| Húðkrabbi | 17 | 13 | 14 | 9 | 11 | 11 | 18 | 20 | 16 | 15 | 40 | 32 | 21 | 26 | 23 | 36 | 23 | 31 | 38 | 33 | 39 | 34 | 40 | 70 | 64 | 58 |

## Yvirlit yvir øll krabbasløg seinastu 10 árini




| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prostatakrabbi | 29 | 36 | 26 | 22 | 33 | 19 | 29 | 33 | 45 | 34 |
| Bróstkrabbi | 20 | 22 | 24 | 22 | 25 | 25 | 32 | 40 | 50 | 37 |
| Lungnakrabbi | 16 | 20 | 16 | 15 | 26 | 20 | 24 | 28 | 28 | 29 |
| Brisi | 6 | 12 | 8 | 5 | 8 | 6 | 12 | 6 | 5 | 11 |
| Lívmóðurhálskrabbi | 6 | 0 | 2 | 1 | 4 | 11 | 2 | 10 | 11 | 11 |
| Lívmóðurkrabbi | 4 | 6 | 4 | 3 | 3 | 6 | 3 | 9 | 5 | 8 |
| Vulvakrabbi | 3 | 1 | 0 | 1 | 2 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| Eggrótakrabbi | 6 | 5 | 4 | 5 | 4 | 4 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| Spísirørskrabbi | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 | 5 | 4 | 9 | 8 |
| Magakrabba | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 | 3 | 5 | 7 | 8 |
| Tjúkktarmskrabbi | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 | 28 | 32 | 31 | 45 |
| Endatarmskrabbi | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 | 8 | 14 | 18 | 11 |
| Móðurmerkjakrabbi | 6 | 6 | 3 | 1 | 3 | 9 | 8 | 5 | 3 | 6 |
| Húðkrabbi (vanligur) | 23 | 31 | 38 | 33 | 39 | 34 | 40 | 70 | 64 | 58 |
| Annar krabbi | 55 | 53 | 74 | 58 | 57 | 45 | 56 | 62 | 91 | 87 |

**Krabbameinstilburðir í Føroyum seinastu 10 árini**

| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prostatakrabbi | 29 | 36 | 26 | 22 | 33 | 19 | 29 | 33 | 45 | 34 |
| Bróstkrabbi | 20 | 22 | 24 | 22 | 25 | 25 | 32 | 40 | 50 | 37 |
| Lungnakrabbi | 16 | 20 | 16 | 15 | 26 | 20 | 24 | 28 | 28 | 29 |
| Brisi | 6 | 12 | 8 | 5 | 8 | 6 | 12 | 6 | 5 | 11 |
| Lívmóðurhálskrabbi | 6 | 0 | 2 | 1 | 4 | 11 | 2 | 10 | 11 | 11 |
| Lívmóðurkrabbi | 4 | 6 | 4 | 3 | 3 | 6 | 3 | 9 | 5 | 8 |
| Vulvakrabbi | 3 | 1 | 0 | 1 | 2 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 |
| Eggrótakrabbi | 6 | 5 | 4 | 5 | 4 | 4 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| Spísirørskrabbi | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 | 5 | 4 | 9 | 8 |
| Magakrabba | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 | 3 | 5 | 7 | 8 |
| Tjúkktarmskrabbi | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 | 28 | 32 | 31 | 45 |
| Endatarmskrabbi | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 | 8 | 14 | 18 | 11 |
| Móðurmerkjakrabbi | 6 | 6 | 3 | 1 | 3 | 9 | 8 | 5 | 3 | 6 |
| Húðkrabbi (vanligur) | 23 | 31 | 38 | 33 | 39 | 34 | 40 | 70 | 64 | 58 |
| Annar krabbi | 55 | 53 | 74 | 58 | 57 | 45 | 56 | 62 | 91 | 87 |
| **Samanlagt** | **214** | **226** | **237** | **204** | **256** | **214** | **253** | **320** | **370** | **356** |

Hagtøl

Kelda: Landssjúkrahúsið

Krabbameinsskráseting Føroya, Medisinski depilin.

*NORDCAN [http://www-dep.iarc.fr/NORDCAN/DK/frame.asp](http://www-dep.iarc.fr/NORDCAN/DK/frame.asp)*